# Føroyingur við til at

**Bátasmiðurin Hanus Jensen hevur í eini 13 ár starvast í útlondum og síðstu mongu árini hevur hesin hegnismaðurin starvast á víkingasavninum í Roskilde, har hann millum annað hevur verið við til at smíða heimsins størsta víkingaskip. Skipið kemur í dag til Dublin, eftir at hava siglt úr Thyborøn**

VÍKINGASKIP
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Í dag kemur víkingaskipið Havhingsten til Dublin. Ferðin byrjaði í Thyborøn í Danmark, og manningin er vanliga eini 60 til 65 mans. Næsta ár siglir skipið úr Dublin til Roskilde, har skipið eisini er smíðað.

## Føroyskur bátasmiður

Tað eru 4 ár síðani, at arbeiðið at smíða Havhingsten byrjaði, og ein føroyskur bátasmiður hevur verið við í serstøku verkætlanini. Tað er skúvoyingurin Hanus Jensen, sum sjálvur fimti hevur verið við til at smíða víkngaskipið, sum nú siglir á havleiðunum, har víkingaskip sigldu fyri 1000 árum síðani, og sum í dag kemur til Dublin.

Hanus Jensen sigur, at tað var fantastiska spennandi at smíða skipið, tí hetta er ørðvísi á so mangan hátt.

- Alt er hondgjørt og gjørt við amboðum, ið eru eftirgjørd eftir amboðum úr víkingatíðini, so sum øksir og annað. Vit hava sjálvir felt við í skóginum, tí serligur viður skuldi til. Alt er gjørt á gamlan hátt og t. d. eru borðini klovin við kílum, sigur Hanus Jensen, og nevnir hóp av byggitekniskum snildum, ið eru nýtt í arbeiðinum at eftirgera víkingaskipið.

- Borðini eru klinkað við jarnnaglum. Umleið 7000 jarnnaglar eru nýttir og umleið 1000 trænaglar, sigur Hanus.

Leggjast kann afturat, at 300 eikitrø skuldu til, fyri at byggja Havhingsten.

Fimm mans hava í fýra ár arbeitt við at smíða víkngaskipið Havhingsten. Arbeiðið byrjaði í 2004. Skipið er eftirgerð av leivdum av fimm víkingaskipum, sum funnin eru í fjørðinum í Roskilde.

- Skipið er gjørt eftir hesum skipum, men har vantaði sjálvsagt nógv, so vit hava roynt sum best. Skipið er 30 metrar langt, 3,80 metrar breitt og vigar 6 tons. Vit koyrdu 80 tons av hagguspønum burtur, tá liðugt var, sigur Hanus Jensen, og leggur afturat, at talan er um sera tungt arbeiði.

- Neyðugt er at hyggja at upprunatilfarinum. Øll



amboð eru ikki til í dag, so vit hava roynt at finna fram til amboð, ið geva somu spor, sum upprunatilfarið hevur. Tá liðugt er, so skuldi sæð út, eins og upprunatilfarið, sigur Hanus Jensen.

## Serstøk kensla

Hanus Jensen sigur, at tað var ein serstøk kensla, tá Havhingsten varð flotaður.

- Vit flotaðu skipið á nátt. Hetta varð náttina fyri, at Havhingsten alment skuldi flotast, og vit flotaðu og fluttu bátin hagar, ið almenna sýningin av bátinum skuldi fara fram (Thyborøn, blðm.), sigur Hanus Jensen.

- Tað var ein sertsøk kensla, og ein var sjálvsagt spentur uppá, um alt nú helt, og so framvegis, sigur Hanus Jensen.

## Nýtt bátasnið

Hanus Jensen er í Føroyum kendur sum bátasmiður. Hann smíðaði bátin Dianu Victoriu, sum Ove Joensen á sinni róði til Danmarkar. Hann hevur eisini smíðað kappróðrarbátar, t.d. Jarnbard, sum hevur vunnið fleiri meistaraheiti.




*Kortið vísir siglingarleiðina og ferðaætlanina hjá Havhingsten*